# Soffi Egholm púra paff

**Forkvinnan á sinnisbata er forfard av ætlanini um at gera ein psykiatriskan økisdepil í tilknýti til ætlaða ellis-og røktarheimið í Vági. Tað er heilt langt úti sigur hon**

PSYKATRISKUR ØKISDEPIL
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo

Tað kemur fullkomiliga óvart á Soffi Egholm, at ætlanin nú er at byggja ein psykiatriskan økisdepil í Suðuroy.

Sum tað sæst longur niðri á Portalinum, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, at bæði landsstýrið og samgongan hava tikið undir við eini ætlan hjá honum um at byggja ein psykiatriskan økisdepil í Suðuroy

Og hann sigur, at depilin skal byggjast í tilknýti til ætlaða ellis-og røktarheimið í Vági.

Tað ger forkvinnuna í Sinnisbata púra forfarda.

Soffi Egholm sigur, at hetta er heilt langt úti og hon skilir púra onki.

Hon sigur, at hon situr í eini bygginevnd, sum skuldi vera við í viðgerðini av hesum máli, men hon er ikki innkallað í hesum sambandi og tí veit hon onki um ætlanina.

Hon sigur kortini, at hon hevði hoyrt eitt graml um hetta, men at hon hevur spurt hans Paula Strøm, men hann avsannaði tað.

Tí kemur tað heilt óvart á hana, at landsstýrið setir eitt slíkt tiltak í verk uttanum yvirhøvur at spyrja tey, sum skulu brúka hesa tænastuna.

-Tað er átaluvert, leggur hon afturat.

Hon vísir á, at tað ljóðar bæði undarligt og sum at blandingur er komin í, tá ið Hans Pauli Strøm sigur, at endamálið við deplinum er at samskipa bæði sosialpsykiatrisk bústaðar- og virknistilboð og økispsykiatriskar fyribyrgjandi og eftirviðgerandi tænastur fyri sinnisveik.

- Sosialpsykiatri er til tey, sum eru útskrivað av sjúkrahúsið, men sum hava brúk fyri stuðuli og eftirlitið.



*- Eg skilji ikki, at landsins myndugleikar kunnu bera seg soleiðis at ímóti einum bólki í samfelagnum, sum er rættiliga veikur, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata*

Men økispsykiatri er fyri fólk, sum eru verða brádliga sálarliga sjúk og sum hava brúk fyri eini sjúkrasong, har tey kunnu fáa heilivág. Hetta eru fólk, sum hava brúk fyri sjúkrahúsi, sum kann taka blóðroyndir og annað. Endamálið við tí er, at fólk, sum verða sálarliga sjúk, kunnu koma í skjóta viðgerð, so at tey koma skjótari fyri seg aftur.

- Eg dugi slett ikki at hugsa mær, at ætlanin er at leggja eina slíka tænastu upp at einum ellis- og røktarheimi. Tað besta er tvørturímóti, at ein slík tænasta er tætt við eitt sjúkrahús.

- Tað, sum ætlanin nú er at gera, er ikki eitt kvalifiserað tilboð til tey fólkini, sum hava brúk fyri hesi tænastuni, sigur Soffi Egholm. Og eg skilji ikki, at landsins myndugleikar vilja gera slíkt ímóti einum bólki í samfelagnum, sum er rættiliga veikur.

- Tað er syndarligt at leggja slíkt upp at einum ellis- og røktarheimi, leggur forkvinnan í sinnisbata afturat.

# Soffi Egholm misskilt okkurt grundleggjandi

**Tað er tann politiski myndugleikin, sum tekur avgerðina, men fyri tað hevur Sinnisbati ein týðandi leiklut, sigur Hans Pauli Strøm**

PSYKIATRISKUR ØKISDEPIL

Áki Bertholdsen

aki@sosialurin.fo



*Sinnisbati er ikki ein politiskur myndugleiki, men eitt áhugafelag og tað er ikki fyrrenn nú, avgerðin er tikin, at Sinnisbati kemur inn í myndina, sigur Hans Pauli Strøm*

- Soffi Egholm má hava misskilt okkurt grundleggjandi.

Tað er svarið frá hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum, til atfinningarnar frá forkvinnuni í Sinnisbara til ætlanina at byggja økispsykiatriskan økisdepil í Vági.

Hann staðfestir, at tað er altíð politiski myndugleikin, altso landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, sum taka tað politisku og fyrisitingarligu avgerðina, grundað á eitt fakligt tilmæli frá psykiatriska sakkunnleikanum, um í hesum føri er leiðslan fyri psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, umframt deildin fyri sinnisveik í heimarøktini og serforsorgin.

- Sinnisbti er ikki ein partur í politiska myndugleikanum, ella í teirri fakligu fyrisitingini og tí er Sinnisbati heldur ikki avgerðarmyndugleiki.

- Sinnisbati er eitt áhugafelag. Men tí er tað sjálvandi týdningarmikið, at felagið er við í arbeiðnum at útgreina ætlanina og at leggja hana ítøkiliga til rættis. Men tað er altíð tann politiski myndugleikin, sum hevur avgerðina, slær hann fast.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, sigur, at tað, sum ætlanin er at gera í Vági er beinleiðis eftir tilmæli frá hægsta psykiatriska ser-kunnleikanum, eitt nú psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, deildini fyri sinnisveik og leiðsluni fyri økisterapiini.

Hans Pauli Strøm sigur, at tað er ikki fyrrenn nú at tann politiska og fyrisitingarliga avgerðin er tikin, at Sinnisbati kemur inn í myndina, tí nú skal ætlanin útgreinast og ítøkiliggerast og nú skal stovnurin innrættast, so at vit fáa greiði á, hvørji rúm skulu vera í honum, hvussu tey skulu síggja út, hvørjir hentleikar skulu vera o.s.fr.

- Til at gera hetta arbeiðið, fari eg nú at innkalla eina bygginevnd, sum eisini er sett at fyrireika ein annan psykiatriskan stovn í Suðurstreymoy.

Í hesi bygginevndini eru umboð fyri Sinnisbata, psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, deildina fyri sinnisveik, almanna- og heilsumálaráðið og Landsverk.

Hans Pauli Strøm sigur, at tað er í hesi bygginevndini, at Sinnisbati fær gjørt sína ávirkan galdandi.

- Og tað er tann rætta mannagongdin, leggur hann afturat.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, sigur, at tað, sum ætlanin er at gera í Vági er beinleiðis eftir tilmæli frá hægsta psykiatriska serkunnleikanum, eitt nú psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum og deildini fyri sinnisveik.

- Hetta er nakað nýtt í Føroyum og sostatt nýskapandi. Tí kann talan verða um, at hetta fer at vera brúkt sum fyrimynd fyri líknandi stovnar aðrastaðni í landinum

Men hann leggur dent á, at hóast stovnarnir verða bygdir saman, er talan um tveir stovnar, eitt røktarheim og ein økisdepil fyri psykiatri.

## Tilmæli um psykiatriskan økisdepil í Suðuroy

Hetta er tilmælið, sum avgerðin at gera ein psykiatriskan økisdepil, byggir á.

Tilmælið er soljóðandi

»Viðvíkjandi sosialpsykiatriskum bústaðar- og virknishúsi í Vági«

Undirritaðu hava, eftir áheitan landsstýrismansins, viðgjørt ætlanina um at byggja sosialpsykiatriska eind í tilknýti til ætlaða røktarheimið í Vági.

Vit halda at styrkin við ætlanini liggur í, at tað við hesi nýbyggjan verður bygt beinleiðis til endamálið. Hetta gevur sera góðar møguleikar til at samskipa ymisk sosialpsykiatrisk og økispsykiatrisk tilboð.

Møguleiki verður at byggja sosialpsykiatriskar búeindir og virknistilboð saman, og at hetta soleiðis kann verða ein sosialpsykiatriskur depil úti í økinum, og meta vit hetta vera eina gongda leið.

Út frá teimum metingum, sum eru gjørdar av tørvinum, bæði av økispsykiatriskari tænastu og sosialpsykiatriskum bústaðum, vilja vit mæla til, at gjørdir verða 8 sosialpsykiatriskir bústaðir og 2 umlættingarpláss á staðnum. Harumframt er sera umráðandi at hava rúm fyri virknistilboðum, bæði til búfólkini, men eisini til onnur sálarsjúk, sum búgva í Suðuroynni. Sera umráðandi er eisini, at hetta kann gerast ein miðstøð hjá stuðulsskipanini fyri sinnisveik og ein samskipandi eind av teimum tilboðum, sum eru til sálarsjúk í økinum.

Vit hava eisini umrøtt viðurskiftini við at byggja aftrat einum røktarheimi, sum serliga rúmar eldri fólki. Vit meta fyrimunirnar við sambyggingini vera størri enn vansarnar.

Sostatt fara vit at viðmæla, at arbeitt verður víðari við hesi ætlan.

*Regin Johansen, virkandi stjóri í Heimarøktini og serforsorgini*
*Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, Psykiatriski Depilin*
*Tormóður Stórá, læknafakligur depilsleiðari, Psykiatriski Depilin"*